# Fólk hava virðing fyri kirkjugarðinum



*"Um tey deyðu bert gott at tala"*, sigur gamalt orðafelli.
Á Viðareiði er ein maður, sum ynskir at gera sítt til at tær gomlu gravirnar við kirkjugarðin ikki skulu forfarast

*Gravsteinarnar hevur Dánjal fingið til vega úr Malinsfjalli (í bakgrundinai). – Nú má eg fara avstað aftur eftir fleiri steinum, tí nú er eingin eftir, sigur Dánjal*
*Mynd: Høgni Thomsen*

**BYGDARSØGA**

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Viðareiði:** – Hetta er alt eitt sjálvboðið arbeiði, sum eg geri í frítíðini, sigur Dánjal Lydersen av Viðareiði.

Fyri hann hevur tað alstóran týdning, at komandi ættarlið kunnu vitja tey støðini, har forfedrar teirra liggja grivnir.

Hann hevur sjálvur stóran áhuga í hesum, men hevur harafrat fingið stóra hjálp frá teimum eldru fólkunum í bygdini.

– Eg havi skrivað nógv niður og havi arbeitt so nógv við hesum, at eg kenni kirkjugarðin til fulnar.

– Um onkur hevði flutt steinarnar burtur, hevði eg lættliga kunnað sett teir uppá pláss aftur, sigur hann.

Mikudagin í farnu viku hittu vit Dánjal á kirkjugarðinum við Viðareiðis kirkju, har hann hevur brúkt mangar tímar til frítíðarítriv sítt.

### Í síðstu løtu

Dánjal hevur altíð havt áhuga fyri tí søguliga. Hesin áhugin fyri at varðveita gravstaðirnar í heimbygdini tók av álvara dik á seg fyri sløkum 30 árum síðani - umleið 1990.